## Chelsea má spara

Eisini Roman Abramovich er raktur av altjóða fíggjarkreppuni, og tí situr lokið ikki eins leyst í Chelsea, sum tað hevur gjørt. Hetta sigur Frank Arnesen, sum er leiðari av ungdómsdeildini hjá Chelsea, og sum í nógvar mátar verður roknaður sum tann, ið stendur Abramovich næst í Chelsea. - Vit hava skert raksturin munandi innan skóting og innan onnur øki við. Hinvegin nærkast vit alsamt løtuni, tá Chelsea kann standa á egnum beinum, sigur Frank Arnesen við enskar miðlar. Higartil hevur russiski Roman Abramovich brúkt hundraðtals milliónir pund í strembanini eftir at gera Chelsea til heimsins mætast fótbóltsfelag.



## Barca-talent heldur fram

Arsenal hevur í eina tíð havt gott eyga á 20 ára gamla Sergio Busquets, men tað er líkt til, at Busquets heldur fram í spanska felagnum FC Barcelona. Busquets spældi í fjør á eykaliðnum hjá Barcelona, men nú er hann tikin við í 1. Liðshópin, og fyrr í ár spældi hann fyri fyrstu ferð á besta liðnum hjá Barcelona. Nú vil Barcelona leingja sáttmálan við Basquets, og samráðingarnar um nýggjan sáttmála eru í gongd.

# Londonliðini lógu framvið

**Arsenal yvirhálaði Manchester United á vøllinum og stigatalvuni um vikuskiftið, meðan Tottenham nú eru ósigraðir í fýra dystir á rað. Fulham vann eisini, meðan West Ham sum einasta Londonliðið tapti**



*Stórur rómur á Emirates har Arsenal vann stórdystin ímóti Manchester United*

*Mynd: Polfoto*

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Darren Bent, Nicolas Anelka og Samir Nasri umboða allir hvørt sítt felag í enska hø vuðsstaðnum. Felags fyri teir eru, at teir skutu tvey mál hvør og gjørdust sigursharrar í dystum teirra.

West Ham var einasta Londonliðið, ið tapti. Everton vann 1-3, har Louis Saha gjørdi tvey mál og legði upp til tað triðja, ið Lescott syrgdi fyri. Málið hjá West Ham átti Collison.

Hjá vinnandi Londonliðunum leggja vit fyri við Darren Bent, sum var hann høvuðsarktekturin handan 1-2 sigurin hjá Tottenham á Manchester City-milliónunum. Robinho legði Manchester City framum, men stutt eftir varð Gelson Fernandes útvístur og so gjørdist tað trupult hjá heimaliðnum. Darren Bent javnaði tá stívliga ein hálvur tími var spældur, og nakað inn í seinna hálvleik legði hann Totthenham framum.

Móti dystarenda varð Richard Dunne eisini vístur av vøllinum, soleiðis at Manchester City einans vóru níggju mans. Tottemham endaðu sum sigursharrar, men vóru kortini ikki fullmannaðir, tá tað var leyst og liðugt, tí í yvirtíðini sá Benoit Assou-Ekotto reytt og noyddist av vøllinum.

Tapið hjá Manchester City er tað triðja á rað, meðan Tottenham veruliga hevur fingið gongd á undir Harry Redknapp. Liðið hevur vunnið tríggjar av teimum seinastu fýra dystunum, umframt at hava spælt javnt ímóti Arsenal.

### Toppliðið og toppskjúttin

Chelsea og ikki minst Nicolas Anelka vóru sannførandi á útivølli móti Blackburn. Franski áleyparin gjørdi bæði málini hjá Chelsea, sum harvið staðfesti sína støðu sum oddalið í Premier League. Nicolas Anelka staðfesti eisini, at hann er ógvuliga væl fyri í løtuni. Í teimum 12 dystunum, ið higartil eru spældir í Premier League í ár, hevur hann skotið ikki færri enn tíggju mál – tvey fleiri enn Amr Zaki hjá Wigan.

### Arsenal yvirhálaði

Triðja Londonliðið, ið sigraði um vikuskiftið, spældi leygardagin og fekk mestu umrøðuna í ensku fjølmiðlunum. Ungu Arsenal-leikararnir bastu nevniliga heimsstjørnunum hjá Manchester United. Á odda gekk 21 ára gamli franskmaðurin Samir Nasri. Hann legði Arsenal á odda bæði 1-0 og 2-0.

Ikki tí, Manchester United hevði sanniliga sínar kjansir, og serliga Wayne Rooney misnýtti fleiri upplagdar møguleikar. Ein minutt fyri leiklok bragdaði tó hjá Manchester United, tá høgri bakkurin Rafael da Silva setti bóltin í netið við einum góðum fluktara. Men tá var ov seint, og Arsenal vann sostatt stórdystin á Emirates leikvøllinum. Harvið fóru teir eisini framum Manchester United á stigatalvuni, og liggja teir í løtuni seks stig handan Chelsea og Liverpool.

### Liverpool heldur tørn

Júst Liverpool ger eisini sítt í oddastríðnum. Leygardagin vunnu teir 3-0 á West Bromwich. Eins og hjá áður umrøddu liðum, var tað eisini ein maður, ið gekk undan og gjørdi tvey mál. Talan var um Robbie Keane, sum gjørdi síni bæði fyrstu ligamál fyri Liverpool, síðani skifti frá Tottenham í summarsteðginum. Síðsta málið hjá Liverpool gjørdi verjuleikarin Alvaro Arbeloa.

### Tætt í botninum

Í hinum endanum á stigatalvuni er tað óvanliga tætt, nú komið er ein lítlan triðing ávegis í kappingini. Aftast liggur West Bromwich við 11 stigum, men liðið hevur bara trý stig upp til Fulham, ið liggur nummar tíggju. Millum hesi lið og sjálvan toppin liggur millum annað Hull, sum legði so bragdliga fyri í deildini, men nú hevur tapt tríggjar dystir á rað. Um vikuskiftið máttu teir lúta fyri Bolton, ið vann við máli frá Matt Taylor.

**Støðan í Premier League:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 29 |
| 2 | Liverpool | 29 |
| 3 | Arsenal | 23 |
| 4 | Manchester United | 21 |
| 5 | Aston Villa | 20 |
| 6 | Hull | 20 |
| 7 | Everton | 18 |
| 8 | Middlesbrough | 17 |
| 9 | Portsmouth | 17 |
| 10 | Fulham | 14 |
| 11 | Bolton | 14 |
| 12 | Stoke | 14 |
| 13 | Manchester City | 13 |
| 14 | West Ham | 13 |
| 15 | Blackburn | 13 |
| 16 | Tottenham | 12 |
| 17 | Wigan | 12 |
| 18 | Newcastle | 12 |
| 19 | Sunderland | 12 |
| 20 | West Bromwich | 11 |

--

**Úrslitini hetta vikuskiftið:**

| | |
|---|---|
| Fulham - Newcastle | 2-1 |
| Aston Villa - Middlesbrough | 1-2 |
| Manchester City - Tottenham | 1-2 |
| Blackburn - Chelsea | 0-2 |
| Liverpool - West Bromwich | 3-0 |
| Sunderland - Portsmouth | 1-2 |
| West Ham - Everton | 1-3 |
| Hull - Bolton | 0-1 |
| Arsenal - Manchester United | 2-1 |
| Wigan - Stoke | 0-0 |